Tíðindaskriv

# Bogaskjóting

**Fyrstu innandura kappingarnar í bogaskjóting hava verið í Runavík um vikuskiftið. Leygardagin 17. november skutu børn 16 ár og yngri á 12 metra frástøðu, og sunnudagin 18. november skutu vaksin á 18 metra frástøðu**

## Úrslit børn

Tíverri var bert ein luttakari í compound bólkinum, men tað forðaði honum ikki at gera sítt besta. Magnus Andreassen, Ørvur, skeyt (282+283) 565 stig og megnaði harvið í fyrstu kappingini kravið til at sleppa til Danmarkar at skjóta í stórari kapping í februar 2008.

Í recurve bólkinum vóru 10 luttakarar og vóru bestu úrslitini innleiðandi:

Nr. 1 Marius Høgnesen, Tambar, (238+239) 477 stig, nr. 2 Heðin Olsen, Tambar, (235+231) 466 stig og persónligt met, nr. 3 Bogi Andreasen, Vágaskot, (223+242) 465 stig og nr. 4 Tummas Eidesgaard, Ørvur, (229+230) 459 stig og persónligt met.

Íalt vóru 5 persónlig met.

Í finalu umførunum vóru úrslitini hesi:

1/8-finalur: Páll í Baiansstovu, Tambar; og Sirið Rein, Tambar, 65-79. Rógvi Dalsgarð, Tambar, og Rani Joensen, Tambar, 56-80. Hini sótu yvir til næsta umfar.

¼-finalur: Marius og Sirið 91-93. Heðin og Rógvi Larsen, Tambar, 91-85. Tummas og Bogi Mørkøre, Ørvur, 99-93. Bogi A. og Rani 90-52.

½-finalur: Sirið og Tummas 54-85. Heðin og Bogi A. 91-104.

Bronsufinalan: Sirið og Heðin 68-92.

Gullfinalan: Tummas og Bogi A. 90-100.

## Úrslit vaksin

Luttakaratalið var ikki av tí mesta hjá teimum vaksnu, men úrslitini vóru góð. Í compound bólkinum vóru tríggir luttakarar, sum høvdu hesi úrslit innleiðandi:

Nr. 1 Per Holm Andersen, Ørvur, (284+282) 566 stig, nr. 2 Jógvan Niclasen, Tambar, (284+275) 559 stig og nr. 3 Sigrid K. Vang, Ørvur, (272+276) 548 stig.

½-finalur: Per sat yvir ímeðan Jógvan og Sigrid dystaðust, úrslitið var 117-111. Við hesum úrsliti tangeraði Jógvan føroyska metið fyri 12 pílar.

Gullfinalan: Per og Jógvan skutu ein sera javnan dyst, sum endaði 113-114.

Í recurve bólkinum vóru 8 luttakarar og vóru bestu innleiðandi úrslitini hesi:

Nr. 1 Hans Petur Højgaard, Ørvur, 268+265) 533 stig, nr. 2 Jastrid M. Jensen, Tambar, (254+249) 503 stig og persónligt met, nr. 3 Jógvan Magnus "Eggaba" Andreasen, Vágaskot, (249+243) 492 stig og nr. 4 Bogi Andreasen, Vágaskot, (237+236) 473 stig.

Í bólkinum vóru fýra persónlig met.

Í finalu umførunum vóru úrslitini hesi:

1/4-finalur: Hans Petur og Nikkel Petersen, Ørvur, 108-75. Jastrid og Jim S. Guttesen. Vágaskot 96-82. Bogi A. og Andras á Lofti, Vágaskot, 101-86. Eggaba og Tórfinn Hansen, Vágaskot, 110-100.

½-finalur: Hans Petur og Bogi A. 114-99. Jastrid og Eggaba 106-100.

Bronsufinalan: Bogi A. og Eggaba 85-105.

Gullfinalan: Hans Petur og Jastrid 112-94

Høvuðsstuðul hjá Bogaskjótideildini er Tryggingarfelagið Føroyar.

*Schandorff Vang,*
*Formaður*
*Bogaskjótideildin*




*Frá vinstru Jastrid M. Jensen, Hans Petur Højgaard og Jógvan Magnus "Eggaba" Andreasen*



*Frá vinstru Per Holm Andersen, Jógvan Niclasen og Sigrid K. Vang*



*Frá vinstru Magnus Andreassen og Bogi Andreasen*

# Fleiri nálir til tey ungu



*Frá vinstru:*
*Jarmund, Eybjørn, Pál, Sofus, Malan, Jón, Mona, Erna Katrin, Shaila, Oddny, Danjal Martin, Annmari, Sára, Jón og Helena*

**Í vikuskiftinum var seinni partur av kappingin er onnur av tveimum møguleikum hjá føroysku elituni at tryggja sær luttøku til Evropa Meistaraheitið í svimjing, sum verður um hálvan desember í Ungarn**

SVIMJING
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Svimjisambandið senda fýra íðkarar til kappingina t.e. tvær gentir og tveir dreingir. FINA stigatalvan verður avgerandi fyri hvør skal við. Fyrsti møguleikin at tryggja sær lutøku, varð í Klaksvík vikuskiftið 10. november

Vikuskiftið 9.-11. november var fyrsti liður av kapping um at gera seg skikkaðan til EM í Ungarn, hálvan desember. Í Klaksvík fingu fleiri bronsu og silvurnálir, og eisini í Vági í hesum vikuskiftinum vóru nøkur, ið vunnu sær nakrar nálir.

Hesar nálir eru nakað undarligt nakað, um man ikki veit hvat tað merkir. So fyri at royna at lýsa tað sum frægast, kann sigast, at minsta krav til at vera við til FM í svimjing, er at ein hevur megnað at svomið sær til í minsta lagi eina bronsunál.

### Nýtt klientel

Sostatt hevur føroyska svimjiítróttin fingið nýggj andlit inn í myndina, tí í hesum báðum umtalaðu kappingum hava fleiri nýggj og ung nøvn í svimjihøpi, vunnið sær rætt til at luttaka í FM kappingum framyvir.

## FAKTA

**Bronsunál:**
**(verður latin svimjarum sum klára 305 ella fleiri FINA stig)**

**FO met**
Kári J. á Høvdanum Ægir FO met í 50m rygg við tíðini 0.26.87
Pál Joensen SUSVIM FO met í 200m firvald við tíðini 2.11.03
Pál Joensen SUSVIM FO met í 200m blandað við tíðini 2.11.33
Pál Joensen SUSVIM FO met í 400m blandað við tíðini 4.37.01

**Bronsu nálir:**
Katrina Akursmørk Ægir í 50m frí við tíðini 0.35.30
Hanna Nysted SUSVIM í 200m frí við tíðini 2.50.52
Jarmund Steinkross SUSVIM í 200m bringu við tíðini 3.06.55
Jákup K Hansen HS í 50m frí við tíðini 0.31.54
Hanus á Tjaldrafløtti HS í 50m frí við tíðini 0.30.64
Eyðbjørg Jacobsen Flot í 50m frí við tíðini 0.35.87
Hanna R. Nysted SuSvim í 200m frísvimjing
Jarmundur Steinkross SuSvim í 200m bringusvimjing